# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.03.2016*

**Bygdaráðsfundur: 29.03.2016 kl. 17.00 til kl. 18.15**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 34/2016 Rakstrargøgn, innbúgv, keyp og viðlíkahald**
J.nr. 83.11.01-G01-1-15
**Málslýsing**
Flyting av fígging, fyri keyp av bili, frá 2015 til 2016 – onnur viðgerð.

Á bygdaráðsfundi 26.10.2015 var samtykt at keypa nýggjan bil til teknisku deild, og tikið var av tilboðnum frá KJ Hydraulik. Samtykt var eisini, at bilurin skuldi og fíggjast við lántøku.

Av tí, at bilurin ikki er komin í 2015 er neyðugt at flyta fíggingina av keypinum fyri bilin til 2016.

**Tilmæli**
Á fundi 24.02.2016 mælir Fíggjarnevndin til, at fíggingin, fyri keyp av nýggjum bili, verður flutt til 2016.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt**.**

**Tilmæli**
Á fundi 18.03.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av, at fíggingin, fyri keyp av nýggjum bili, verður flutt til 2016.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 35/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-5-16
**Málslýsing**
Í skrivi 22.02.2016 søkir Jóhan á Lakjuni um loyvi at ogna sær lendið til grundstykki burtur av matr. nr. 357a, Tofta bygd. Lendið talan er um, liggur norðast við Brekkuvegin.

**Tilmæli**
Á fundi 10.03.2016 mælir Tekniska nevnd til, at umsøkjarin fær loyvi til at ogna sær lendið, til støddar 683 m².

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 36/2016 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.10.00-P21-1-16
**Málslýsing**
Bryggjan niðanfyri bygningin hjá P/F Eysturoy á Tofta kaj, umfatar Shengenøkið hjá kommununi, og skal girðast inni samb. lógum um vard havnaøkir.

Mettur kostnaður u/mvg kr. 125.250,00.

**Tilmælir**
Á fundi 10.03.2016 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiðið verður gjørt samb. kostnaðarmeting frá teknisku deild, og at arbeiðið verður gjørt av arbeiðsmonnunum hjá kommununi.

Á fundi 18.03.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum havnin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 37/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-4-16
**Málslýsing**
Í skrivi 22.02.2016 søkja Fríða Jacobsen og Poul Ennigarð, Høganesvegur 5, um uppískoytisstykki til matr. nr. 389, heilt suður til markið hjá grannanum, hetta fyri at betra um omankoyringina til sethúsini, sum í dag er sera vandamikil.

**Tilmæli**
Á fundi 10.03.2016 mælir Tekniska nevnd til at umsøkjarin fær loyvi til at ogna sær lendið til uppískoytisstykki.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.03.2016*

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 38 /2016 Alment virksemið yvirhøvur**
J. nr. 00.13.10-G01-1-16
**Málslýsing**
Í eina tíð hevur verið arbeitt við at fáa búmerki á skúlan. Ætlanin er at búmerkið skal verða á klædninginum omanfyri nýggja durin, og festast á tilfar í líkist durinum. Torført er at fáa verandi tilfar, av timbri, at líkjast tí nýggja í litinum, sum skal klæðast innanfyri búmerkið. Uppskot er um at gera alt grátt, dur og nýggja klædningin.

**Tilmælir**
Á fundi 16.03.2016 mælir Mentanarnevndin til, at tað verður grátt innanfyri búmerkið á skúlanum, og at tað verða fjalar soleiðis, at betur samanhangur er í.

Á fundi 18.03.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum skúlin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndin vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 39/2016 Undirvísing**
J.nr. 17.03.20-G01-1-16
Umsókn um stuðul

Í skrivi 15.03.2016 søkir lærari um fíggjarligan stuðul í samband við víðariútbúgving. Talan er um eina útbúgving sum barnabólkaleiðari.

**Tilmælir**
Á fundi 16.03.2016 mælir Mentanarnevndin frá at játta stuðul til endamálið grundað á, at starvsfólkini innan skúlaverkið koma undir Mentamálaráðið, og er sostatt ikki uppgávan hjá kommununi at fíggja víðariútbúgving.

Á fundi 18.03.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt**.**